UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **9. mars 2022**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08503-20**

Svar

upp á

skrivligan § 52a fyrispurning nr. 52-134 / 2021 frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum, um skúlakort til 10. flokk og NámX.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hava allir skúlanæmingar, sum ætla sær víðari eftir 9. flokk, somu almennu ferðamøguleikar til og frá skúla?

2. Er ætlanin at geva NámX og 10. flokkunum somu treytir viðvíkjandi skúlakorti sum næmingar á miðnámi, eftirskúlum og háskúlum?

Svar

Til 1: 10. flokkur er skipaður ymiskt. Í øllum skúlum, sum hava 8. og 9. flokk, halda næmingarnir, sum velja at fara í 10. fl., fram í sama skúla, uttan í Hvalbiar skúla, har næmingarnir fara í 10. flokk í Tvøroyrar skúla, og í Tórshavnar kommunu, har næmingarnir fara í 10. fl. í Nám X í Eysturskúlanum. Í kommununum, sum ikki hava undirvísing í 8., 9. og 10. flokki, hava kommunurnar samstarv við aðra kommunu um undirvísing í 8., 9. og 10. flokki.

Nakrar kommunur hava skipað skúlasamstarv um breytir í 10. flokki, m.a. Fuglafjarðar, Sjóvar og Sunda kommuna hava skipað samstarvið e-nám. Somuleiðis er ávíst samstarv um breytir millum Vága og Sørvágs kommunu, Tvøroyrar og Vágs kommunu og Runavíkar og Nes kommunu.

Meginreglan er, at kommunan rindar fyri næmingaflutning í fólkaskúlanum sambært § 33, stk. 1-4 í fólkaskúlalógini, har ásett er í stk. 1, at kommunustýrið skal skipa fyri flutningi millum skúlar og heim ella nánd av heiminum av næmingum, sum ganga í skúla uttan fyri teirra egnu bústaðarkommunu. Skyldan at skipa fyri flutningi eftir 1. stk. kann vera lokin við at vísa næmingunum til almennar ferðslumiðlar ella við at samsýna teimum útreiðslur til egnan flutning.

Kommunur kunnu sambært § 33, stk. 8. søkja um landskassastudning til lutvísa rindan av útreiðslunum til góðkendar flutningsskipanir eftir 1. stk. Undirvísingarstýrið umsitur

játtanina, sum vanliga er 50% av góðkendari flutningsskipan, sí kunngerð nr. 115 frá 22. november 2000 um næmingaflutning.

Harumframt er ásett í lógini, at kommunustýrið skal skipa fyri flutningi í og úr skúla av næmingum, ið eru sjúkir ella avlamnir, og at kommunustýrið kann skipa fyri flutningi millum skúlar og heim ella nánd av heimum fyri næmingum, sum ganga í skúla í teirra egnu bústaðarkommunu eftir hesum reglum:

1) næmingum upp í 3. skúlaár, ið hava longri skúlaveg enn 2,5 km, og eldri næmingum, ið hava longri skúlaveg enn 3,5 km, og
2) næmingum, ið hava styttri skúlaveg, um so er, at tað er serliga neyðugt fyri tryggleikan hjá næmingunum í ferðsluni, ella um skúlavegurin er ov torførur.

Kommunurnar hava møguleika at veita næmingum, sum fara í 10. flokk ferðamøguleikar í og úr skúla við almmennu flutningsskipanini ella at nýta aðra flutningsskipan, um almenna flutningsskipanin ikki samsvarar við skúladagin hjá næmingunum.

Til 2: Sambært lógaruppskotunum um ferðastuðul til næmingar í frískúlum og eftirskúlum, so eru tað heimstaðarkommunurnar, sum veita næmingunum ferðastuðul.

Viðvíkjandi næmingum fólkaskúlans, so hava kommunurnar hesa heimild sambært fólkaskúlalógini, sum víst er á undir spurningi 1, - kommunurnar gera av, um ferðastuðulin verður veittur sum ferðakort ella við ókeypis flutningi í almennu flutningsskipanini ella við aðrari flutningsskipan.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður